**Hevur tú hug at ávirka rættindi hjá børnum og ungum í Føroyum, og ert tú millum 12 og 16 ár, er hetta kanska nakað fyri teg.**

Tann 16. januar 2020 skipar UNICEF fyri ráðstevnu í Keypmannahavn, har børn og ung úr øllum Norðurlondum fara at luttaka. Eisini børn og ung úr Føroyum eru boðin við.

Ráðstevnan verður hildin, tí Barnarættindasáttmálin hjá ST fyllir 30 ár. Evni fyri ráðstevnuni er grein 12 í Barnarættindasáttmálanum um rættin hjá børnum at greiða frá sínum sjónarmiðum í øllum viðurskiftum, sum viðkoma teimum.

Bólkarnir, sum luttaka á ráðstevnuni, skulu í oktober mánað arbeiða við evninum og koma við tilmæli um, hvussu vit tryggja:

1. at øll børn og ung kenna síni rættindi.
2. at øll børn og ung verða hoyrd og tikin við upp á ráð bæði í familjuni, í skúlanum, í frítíðini og í lokalsamfelagnum.

Tann 16. januar 2020 leggja bólkarnir tilmælini fram á ráðstevnuni í Keypmannahavn.

Bólkurin av føroyskum børnum og ungum fer úr Føroyum tann 15. januar 2020 og heim aftur tann 17. januar 2020. Við á ferðini verða tveir vaksnir fylgjarar. Luttakararnir búgva á Globalhagen Hostel. Bæði ferð og uppihald í Keypmannahavn er ókeypis fyri luttakararnar.

Tú kanst lesa meira um verkætlanina á www.barnabati.fo

Um tú ert millum 12 og 16 ár og hevur hug at luttaka í verkætlanini og á ráðstevnuni, so send okkum eina umsókn. Í umsókníni skal tú upplýsa navn, bústað og aldur. Tú skalt eisini stutt greiða okkum frá, hví tú hevur hug at luttaka í hesi verkætlan.

Foreldur ella verji tín skulu vátta, at tey geva tær loyvi at luttaka. Viðheft er váttan, sum foreldur ella verji tín skulu fylla út og undirskriva.

Send umsókn tína og váttan til jenny@mmr.fo innan 30. september 2019.

Blíðar heilsanir

| | | |
|---|---|---|
| Poul Geert Hansen, aðalstjóri | Sólja í Ólavsstovu | Djóni J. Eidesgaard, aðalskrivari |
| Uttanríkis- og mentamálaráðið | Barnanna umboðsmaður | Barnabati |

# Samtykkiváttan til luttøku í Det Nordiske Børneforum

Undirritaði:

Navn: ____________________________________________________________

Føðingardagur:________________ Postnummar:___________________

Bústaður:____________________ Bygd/býur:_____________________

Telefon:______________________ Teldupostur:____________________

gevur hervið samtykki til at barn mítt/okkara

Navn á barni: ____________________________________________________________

Føðingardagur hjá barni:________________

luttekur í verkætlanini Det Nordiske Børneforum og á sjálvari ráðstevnuni, sum verður í Keypmannahavn 15. – 17. januar 2020.

Dagfesting: ___________________

Undirskrift/foreldur:

______________________________________________________________